listastevna føroya arts festival

# Øssur Bæk fegin um heiðurslegat

**– Hetta er ein stór viðurkenning fyri meg sum tónleikara, sigur føroyski violinspælarin Øssur Bæk, sum júst hevur fingið heiðurslegat úr Peder Møllers Mindefonds Legat**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Í mai mánaði í ár varð Øssur Bæk heiðraður við heiðurslegatinum úr Peder Møllers Mindefonds Legat.

– Eg fekk eitt bræv innum dyrnar frá einum advokatvirki fyrr í ár, og eg visti einki um hetta frammanundan, sigur Øssur Bæk, sum farnu vikuna hevur vant saman við klassiska tónleikabólkinum Aldubáruni. Bólkurin hevur konsert leygarkvøldið í Norðurlandahúsinum.

### Stór viðurkenning

Tí kom tað sera óvart á Øssur, at júst hann varð valdur at fáa hetta legatið. Tað eru danskir tónleikarar, ið greiða atkvøðu um, hvør skal fáa hetta heiðurslegat, og tí er tað samstundis ein stór viðurkenning fyri ein og hvønn violinleikara.

– Hetta er ein stór viðurkenning fyri meg sum violinleikara, og eg eri sera glaður um at fáa hetta legatið, sigur Øssur Bæk.

Í endamálsgreinini hjá Peder Møller Mindefonds Legat verður sagt, at heiðurin verður givin til violinistar »som har gjort sig særlig kunstnerisk bemærket«.

Grunnurin er uppkallaður eftir Peder Møller, sum var hin fyrsti danski violin virtuosurin, ið megnaði at liva av at spæla solo. Hann frumframførdi m.a. Carl Nielsens violinkonsert.

Tann fyrsti violinleikarin, ið fekk heiðurslegatið var navnframi Wandy Tworek, sum eisini hevur vitjað í Føroyum. Eisini hava kendir leikarar so sum Kim Sjøgren og Nikolaj Znaider fingið hetta legatið.



*Øssur Bæk hevur fyri stuttum fingið heiðurslegat úr Peder Møllers Mindefonds Legat. Hann er í løtuni í Føroyum og skal spæla við Aldubáruni í kvøld*
*Mynd: Maria Olsen*

Teir, ið vegna grunnin gera av, hvør skal hava legatið, eru violinprofessarin við Det Kongelige Danske Musikkonseratorium, Peder Elbæk, bratschprofessarin Kim Frederiksen og fyrrverandi kongaligi konsertmeistarin Eivind Sand Kjeldsen.

### Yrkisleikari

Øssur Bæk er 38 ára gamal og hevur búð í Danmark alt sítt lív. Hann hevur tó fast tilknýti til Føroyar og vitjar her einar tvær ferðir um árið.

Hann er fastur limur í Aldubáruni, har hann hevur spælt síðan bólkurin varð settur á stovn í 1995. Í løtuni er Øssur í føstum starvi í Jysk Ensemble í Viborg Amt.

Til konsertina leygarkvøldið fer Øssur at spæla nøkur verk saman við bróðir sínum Rúna Bæk, sum júst hevur lokið útbúgving sum violinleikari í New York. Teir báðir fara at spæla verk eftir farbróðirin Kára Bæk.

Øssur Bæk fór at spæla violin sum átta ára gamal á Suzuki Instituttinum í Keypmannahavn. Síðan fekk hann undirvísing frá Bela Detreköy á Carl Nielsens Akademinum í Odense og spældi samstundis við Odense Symfoniorkester.

Hann fór víðari í læru hjá Viktor Liberman við lærda tónleikaháskúlan í Utrecht í Hollandi og fekk solist diplom í 1990. Í nøkur ár arbeiddi hann sum fyrsti violinistur í Kongaliga Kapellinum í Danmark og var eisini við til at stovna Kongelige Kapels Kammerorkester.

# Stilli áðrenn stormin

**Glaður tónleikur, sum vísir nógvar ymsar kenslur og hugløg. Soleiðis lýsir Guðrun Sólja Jacobsen sjálv ta nýggju fløguna, sum verður at fáa mánadagin**

FLØGUÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Mánadagin verður fyrsta fløguútgávan hjá Guðruni Sólju Jacobsen send á gøtuna, og tað eru nógv, sum bíða í spenningi eftir júst hesi fløguni.

Høvuðspersónurin dylur ikki fyri, at henda fløgan er sera persónlig, tí at tekstirnir lýsa ógvuliga væl tær kenslur og tankar, sum hon sjálv gongur runt við, stendur at lesa á heimasíðu hennara.

Sum lagið »Lonely Waters«, ið snýr seg um at skoða út á hav og leingjast eftir einum, sum stendur á hinari síðuni av havinum. Ella lagið »One In A Million«, sum snýr seg um at taka teir møguleikar, ið standa einum í boði, tí kanska vísa teir seg aldrin aftur.

Guðrun Sólja Jacobsen hevur havt tætt samstarv við framleiðarar og sangskrivarar undir framleiðsluni av hesi fløguni. Teir eru Joakin Pedersen, kapellmeistari í Stjerne for en aften og Jesper Winge Leisner, og hon hevur givið teimum fleiri hugskot til tekstirnar.

### Quiet Storm

Mánadagin verður útgávan hjá Guðruni at fáa til keyps. Fløgan hevur ellivu nýggj løg, sum eru útvald ella skriva til Guðruna. Tó er tað seinasta lagið »Promise Me«, sum hon vann Stjerne for en aftan við. Lagið er spælt inn av nýggjum.

Fløgan hevur fingið heitið Quiet Storm, og Guðrun er avbera væl nøgv við fløguna.

– Eg eri sera, sera væl nøgd við úrslitið, sigur Guðrun, sum vísir á ta fyrstu stakfløguna, ið nevnist »You´re Mine«. Hetta lagið ber brá av country tónleiki, sum Guðruni eisini dámar væl.

Síðan Guðrun vann Stjerne for en aften fyrst í apríl, hevur hon verið á palli umleið hálvthundrað ferðir, og hon hevur eisini verið í upptøkuhølunum við ókendum tónleikarum.

Hetta hevur verið ein kollvelting í lívi hennara, men Guðrun trívist væl í hesum umhvørvinum. Tað tekur sína tíð at venja seg við alt hetta nýggja, men hon nýtur eftir øllum at døma hvørja løtu.

Guðrun Sólja Jacobsen hevði føðingardag tann 11. juli, tá hon gjørdist 21 ára gomul.



*Guðrun Sólja Jacobsen á palli í Forum, tá hon vann Stjerne for en aften. Mánadagin verður fløgan »Quiet Storm« at fáa í sølubúðunum*

ítróttur

Nr. 148 • leygardagur • 9. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Karsten From nýggjur NSÍ-spælari

**Fríggjanáttina sendi NSÍ soljóðandi tíðindaskriv til føroysku fjølmiðlarnar**

NSÍ hevur gjørt avtalu við 23 ára gamla danska spælaran, Karsten From, og er avtalan galdandi fyri restina av hesum kappingarárinum.

Frammanundan hevur hann síðani fyrst í februar spælt 16 dystir við HB og skotið 9 mál í lands- og steypakapping.

Áðrenn hann kom til Føroya, var Karsten From fulltíðarspælari í danska superligufelagnum, FC Midtjylland, har hann var í tvey ár og spældi tíggju dystir á besta liðnum.

NSÍ fegnast um avtaluna við Karsten From, tí við honum er 1. deildarhópurin vorðin enn breiðari og sterkari, nú farast skal undir endaspurtin í landskappingini.

# Nógvir ivaspurningar

**Bæði føroysku og altjóða kappingarreglurnar innihalda fleiri ivamál viðvíkjandi leikaraskiftum og møguleika at flyta spæliloyvi**

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*

NSÍ og Karsten From hava givið hvørjum øðrum hondina.

Somikið varð staðfest hóskvøldið, tá runavíkingar boðaðu frá, at teir nú høvdu tryggjað sær danska álopsleikaran, sum í hesi vikuni varð loystur úr sáttmála sínum við HB, eftir at tað stóð púra greitt, at samstarvstrupulleikarnir partanna millum vóru ov stórir til, at samstarvið kundi halda fram.

### Áhuga- ella yrkisleikari

Í hósdagsútgávu skrivaðu vit, at tað alt fyri eitt hoyrdist, at fleiri føroysk feløg tóktust sýna áhuga fyri leikaranum, men at tað ivaleyst var so, at áhugin fyri at knýta hann at hópinum varð avmarkaður av, at leikarin ikki kundi leika fyri nýggja felagið fyrr enn í fjórð seinasta umfarinum.

Hetta grundaðu vit á, at føroysku reglurnar fyri leikaraskifti siga, at tað skal ganga ein mánaður frá seinasta dystinum fyri fyrrverandi felagið til fyrsta dystin fyri nýggja felagið.

Hetta eru reglurnar, sum eru galdandi, tá áhugaleikari skiftir felag, og hóast Karsten From hevði sáttmála við HB, so var hesin ikki góðkendur av FSF. Ein treyt, sum skal vera lokin, fyri at leikarin skal kunna roknast sum sáttmálaleikari sambært galdandi reglunum.

### Fleiri hol

Tað kann sjálvandi hugsast, at NSÍ gongur undir hesa reglu í hesum førinum, men tað er lítið sannlíkt, at teir bara fara at sita hendur í favn og bíða, tá teir kortini hava leikaran í hópinum. Runavíkingar hava tó ein formann, sum vanliga ber orð fyri at gera sítt heimaarbeiði til lítar, og tað hevur hann eftir øllum at døma eisini gjørt hesaferð.

Tað er nevnliga so, at hóast reglurnar fyri áhugaleikarar seta mánaðarlongu forðingina, so eru tað ymsir hættir, sum kunnu nýtast, til tess at benda hesar reglur.

Ein møguleiki, sum kundi verið aktuellur – og eisini sera prinsipiellur – vildi verið, um NSÍ bara gjørdi bart og gjørdi sáttmála við leikaran. Spurningurin vildi tá verið, hvørt leikloyvið tá fylgdi reglunum hjá áhuga- ella yrkisleikarum. Tað vildi tá verið ein spurningur, sum kappingarnevndin – og møguliga seinni dómsnevndin – skuldu tikið støðu til, og hetta vildi neyvan verið gjørt, fyrr enn málið fyrilá. Tað hevur í øllum førum ikki verð siðvenja, at nevndin hevur tikið nýggjar prinsipiellar støður, fyrr enn málið fyrilliggur, og tí kundi NSÍ við hesum risikerað, at teir teir stóðu við einum leikara, sum enn mátti bíða tríggjar dystir, áðrenn hann kundi sleppa í eldin.

Ein annar møguleiki – og eftir øllum at døma er hesin nýttur – er at HB gevur NSÍ eina hjálpandi hond í málinum. Tá felagið kortini hevur gjørt av, at leikarin ikki verður í hópinum longur, og fleiri av sambiðlunum í oddinum tóktust liggja framvið eftir honum, er tað kanska eins gott fyri HB, at leikarin fer til eitt av liðunum, sum HB hevur leikt báðar dystirnar í ár ímóti. Hartil skal eisini havast í huga, at NSÍ framvegis eigur dystir á móti øllum hinum oddaliðunum, tá HB ikki verður roknað við, og tí kann hugsast, at HB eisini kemur at fáa nyttu burtur úr máltevi leikarans, hóast hann spælir við øðrum felag.

Tað kann av mongum – og ivaleyst eisini av nevndarlimum í FSF – metast sum ómoralskt, um hendan seinna loysnin verður roynd. Tað inniber nevnliga, at HB fríggjamorgunin letur inn sáttmála við Karsten From til góðkenningar, og at felagið so minuttir eftir hetta avhendar leikaran til NSÍ. Ómoralskt, tí hetta líkist einum »smartum« hátti at benda lógarreglurnar, men í øllum førum er tað ikki nøkur juridisk forðing fyri, at hetta verður gjørt. Og so leingi hetta fylgir reglunum hjá FSF, so skuldi leikloyvið verið í tryggum hondum.

### Møguligt eftirspæl

Um so er, at tað verður hendan seinna loysnin, sum verður nýtt, so er málið tó ikki leyst og liðugt av teirri orsøk.

Tað er nevnliga so, at hóast FIFA fyri einum ári síðani setti altjóða transferreglur í gildi, so eru framvegis ivamál á summum økjum. Eitt nú við regluni, sum sigur, at leikari bert kann spæla við tveimum liðum í einum ári. Her er enn ikki staðfest – tí einki slíkt mál er roynt enn – hvørt talan her um eitt og sama kappingarár, ella um talan er um álmanakkaár.

Enn meira fløkt gerst málið, tí føroyska og danska kappingarárið ikki fylgjast. Verður roknað eftir kalendaraárinum, so hevur Karsten From havt sáttmála FC Midtjylland, HB og NSÍ í einum ári. Hetta sjálvandi treytað av, at tað verður loysnin, sum verður nýtt. Hinvegin er kappingarárið, har hann hevði sáttmála við FCM lokið, so tað skal kanska ikki roknast við her.

Sami trupulleiki ger seg eisini galdandi, um Karsten eftir føroyska kappingarárið skuldi fingið møguleika at gjørt nýggjan sáttmála við danskt felag. Hevur leikarin tá loyvi til hetta. Kanska eftir 1. januar, tí vit tá fara í nýtt ár og føroyska kappingarárið tá er lokið, ella kanska ikki, tí tveir av sáttmálunum hava verið í gildið, meðan danska kappingarárið, sum ikki endar fyrr enn ímóti sumri 2004, hevur verið ígongd.

Tað tykjast tó vera ábendingar um, at eingi av landasambondunum vilja taka nakra greiða støðu í hesum máli. Á fundum hjá FIFA hava londini eisini biðið um at fáa greiðar reglur at ganga eftir í hesum, uttan at hetta tó hevur givið úrslit. Tí tykist støðan í flestum førum vera, at eitt nú DBU bert ansar eftir, hvørjar sáttmálar leikarin hevur havt innan egin landamørk, og um so er, so gevur hetta ikki Karsten From nakrar trupulleikar yvirhøvur.

Sostatt eru enn hópur av ósvaraðum spurningum viðvíkjandi leikaraskiftum sum hesum, men hvussu er og ikki, so man tað hóast alt vera lítil ivi um, at Karsten From verður við frá fyrsta bríksli, tá gøtumenn vitja við Løkin í Runavík sunnudagin.



*Karsten From er nú NSÍ, leikari. Og ivaleyst er tað so, at Jákup Mortensen, sum her stendur uttast til høgru, hevur gjørt heimaarbeiðið til lítar. Hinir á myndini eru Ian Højgaard, ítróttarstjóri í NSÍ og so sjálvandi Karsten From*
*Mynd: www.nsi.fo*